# Súni stórtrívist í Su

**-Eg hevði sett eitt hálvt ár av til venja meg við leikferðina í Superliguni. Tí eri eg rættiliga yvirraskaður av, at tað hava verið boð eftir mær so tíðliga til besta liðið og at eg havi fingið so nógva spælitíð, sum eg havi. Eg haldi, at eg róliga kann siga, at eg ongantíð havi verið so væl fyri, sum eg eri í løtuni, fortelur Súni Olsen, sum í summar skrivaði undir við superligufelagið AaB**



ÚTISETI
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

**Aalborg:**
Forbedring ønskes.

Týsdagin 18. oktober hevur vælumtókta danska fótbóltsblaðið, Tipsblaðið, eina fyribils uppgerð yvir avrikini hjá nýggju leikarunum í Superliguni. Saman við so stórum profilum sum André Bergdølmo, Marcus Allbäck, Marcus Lantz, Thomas Rytter og Thomas Rasmussen úr ávikavist FC Keypmannahavn og Brøndby, verður føroyski landsliðsleikarin Súni Olsen eisini vigaður fyri síni avrik í reyð-hvíta AaB búnanum.

Dómurin hjá Tipsblaðnum er so sum so. Blaðmenninir á Tipsblaðnum meta, at gøtumaðurin skal betra um síni avrik í Aab troyggjuni.

Súni Olsen er skjótur at svara aftur. Dagin eftir dómin í Tipsblaðnum verður 24 ára gamli føroyingurin stóra hetjan á Aalborg Stadion, tá hann við rimmar frísparki avgerð steypadystin móti FC Midtjylland.

Síðan hevur skotsterki landsliðsleikarin ikki hugt aftur. Gøtumaðurin við svarta 19 talinum á rygginum hevur verið millum teir fyrstu ellivu teir seinastu tríggjar dystirnar á besta liðnum hjá Aab, og møguleikin fyri at bíta seg fastan á AaB liðið tykist avgjørt at vera til staðar.



*Tá hann fyri fyrstu ferð av álvara fekk møguleikan, tók føroyski landsliðsmaðurin av. Úr 30 metrum knallaði hann frísparksbólt í kassan móti FC Midtjylland, og so var Aalborg víðari í steypakappingini*
*Mynd: Scanpix*

## Gingið skjótt

Hóast teir taptu móti Viborg leygardagin, tykist hýrurin á Aab leikarunum góður. Tað er mánadagur, og liðið úr Aalborg er farið undir at fyrireika seg til stóru uppgávuna um vikuskiftið, tá Brøndby vitjar Aalborg Stadion. Leikararnir og venjarar sita í kantinuni og fáa sær døgurða eftir venjingina í morgun.

Umstøðurnar hjá AaB-leikarunum at venja eru framúr. Her eru hvíldarrúm, fimleikahallir, rennimaskinur, vektrúm og lækna- og fysioterapi høli.

- Jú, eg eri fallin ómetaliga væl til í Aalborg, sigur Súni Olsen, tá vit sessast við eitt av borðunum í kantinuni, eitt sindur burturi frá har hinir AaB-leikararnir sita.

Gøtumaðurin flutti til Aalborg í juli mánaði, og hann sigur seg stórtrívast í Norðurjútlandi og Aab. Sum hjá flest øllum føroyingum, sum royna fótbóltseydnuna uttanlands, hava fyrstu mánaðirnir hjá Súna Olsen verið nýttir at tillaga seg til høgu leikferðina í Superliguni.

Tá føroyski landsliðsleikarin skrivaði undir við AaB í summar, hevði hann sett fyrsta hálva árið av til at venja seg við leikferðina, men tað hevur gingið væl í hond bæði í venjing og dysti, at hann longu nú er fastur fúsur á besta liðnum hjá AaB.

- Eg hevði sett eitt hálvt ár av til venja meg við leikferðina. Tí eri eg rættiliga yvirraskaður av, at tað hava verið boð eftir mær so tíðliga til besta liðið, og at eg havi fingið so nógva spælitíð, sum eg havi. Tað hevur gingið væl til venjing, og eg haldi, at eg so smátt havi vant meg við leikferðina. Eg haldi, at eg róliga kann siga, at eg ongantíð havi verið so væl fyri, sum eg eri í løtuni, fortelur Súni Olsen.

Gøtumaðurin leggur afturat, at mongu skaðarnir og leikbann í AaB hópinum í heyst eisini hava gjørt sítt til, at hann møguliga hevur fingið møguleikan á besta liðnum so tíðliga. Hóast listin yvir skaddar og leikbannaðar leikarar stundum hevur verið langur hjá AaB í heyst, fækkast hann í hvørjum. Í løtuni eru tað bert Thomas Augustinussen, makedonski landsliðsleikarin Artim Sakiri og sviin Matthias Lindstrøm, sum sita uttanfyri, og framvegis er gøtumaðurin millum teir fyrstu ellivu hjá AaB.

Súni Olsen hevur roynt seg á fleiri ymiskum plássum á AaB liðnum. Seinastu vikurnar hevur venjarin í AaB nýtt Súna mitt á miðvøllinum, úti í síðuni og á bakkunum. Seinasta leygardag var føroyski landsliðsleikarin mitt á miðvøllinum saman við danska landsliðsleikarnum, Rasmus Wurtz.

- Spæliskipanin hjá AaB hóskar væl til mín, tí hon minnir nógv um hana, eg havi spælt á landsliðnum. Eg eri hampiliga væl nøgdur við míni persónligu av-